# Kirkjan skal vera væl tryggjað

**Í seinastuni hava bæði bispur og ein kirkjurættarserfrøðin gur fýlst á, at læran hjá einari føroyskari kirkju skal samtykkjast av Løgtinginum, har tað er nóg mikið, at seytjan tinglimir atkvøða fyri at broyta eina lóg. Anfinn Kallsberg vísir á, at tað ber til at grundfesta eina lóg um trúarlæruna eins og stýrisskipanarlógin er grundfest. Hann heldur tó ikki, at løgmaður skal vera bundin at tilmælum frá meinigheitsráðum og prestum, tá hann skal tilnevna nýggjan bisp**

LÓGARTRYGD OG TRÚARLÆRA
*Theodor E. D. Olsen*

Kirkjan skal yvirtakast. Tað hevur Landsstýrið sett sær fyri, men hvussu skal ein yvirtikin føroysk kirkja skipast?

Hendan spurningin hava fleiri sett sær seinastu tíðina, og funnist hevur verið at Landsstýrinum fyri ikki at hava verið ført fyri nágreiniliga at kunnað greitt frá, hvussu ein ætlað yvirtikin kirkja skal skipast og læra í framtíðini.

Í viðtali við Sosialin beint fyri nýggjár segði Hans Jacob Joensen, bispur, at um Løgtingið í framtíðini skuldi samtykkja kirkjulógir og harvið eisini avgera læruna og grundstøðið hjá tí føroysku kirkjuni, so kundi hann vakna sum katolikkur, eftir at hann var farin til songar sum lutherskur bispur.

Í Sosialinum í gjár segði Lisbet Christoffersen, løgfrøðingur, ph. d., ið er ein av fremstu kirkjurættarserfrøðingum í Danmark, at hon metti skipanina, sum skal innibera, at Løgtingið skal avgera læru kirkjunnar, sum "en ganske usædvanlig konstruktion i europæisk kontekst", tí tað er ikki vanligt í dagsins Evropa, at tað verðsliga valdið er so tætt knýtt at tí andaliga. Tí metti Lisbet Christoffersen hetta at vera at fara aftur í tíðina, at Løgtingið skuldi taka støðu til, um kirkjan skal vera evangelisk-luthersk ella okkurt heilt annað.

Eisini setti hon spurnartekn við við leiklutin hjá løgmanni, sum helst verður tann, ið kemur at tilnevna bisp í eini yvirtiknari fólkakirkju, tí í Danmark er kirkjumálaráðharrin, sum ikki eins og drotningin er noyddur at vera limur í fólkakirkjuni, bundin at tilmælunum frá meinigheirsráðum og prestum.

Í Noregi harafturímóti avger stjórnin sjálv, um hon fylgir tilmælunum.



*Anfinn Kallsberg sigur seg væl skilja, at fólk eru á varðhaldi, tá talan er um trygdina hjá kirkjuni í framtíðini. Hann heldur, at tað er møguligt at tryggja trúarlæruna við lóg. líkasum stýrisskipanin er tryggjað.*

### Ikki sama vald

Anfinn Kallsberg, løgmaður, sigur seg væl skilja, at kirkjufólk vilja vita, hvussu føroyska kirkjan verður skipað í framtíðini. Hann leggur dent á, at vit í Føroyum hava eitt avmarkað vald í mun til Danmark, tí meðan danir hava tríggjar valdsinstansir, so eru bert tvinnir í Føroyum. Løgmaður og løgtingsformaðurin hava nevniliga tveir kaskettir í part, sum hann málber seg. Hetta sæst eina best eftir at val hevur verið. Í Danmark verður nevniliga farið til drotningina, sum síðani skal royna at fáa ein samráðingarleiðara at skipa nýggja stjórn. Í Føroyum eigur tann fráfarandi løgtingsformaðurin hesa uppgávuna, ella kann løgmaður halda fram, at parlamentariskt grundarlag er fyri hesum. Løgmaður hevur sostatt tveir kaskettir. Hann skal vera leiðari í umsitingini, sum útinnir, og hann skal staðfesta avgerðirnar hjá tí lóggevandi valdinum, Løgtinginum.

Tí er tað enn torført at samanbera støðuna hjá einari yvirtiknari kirkju við ta donsku kirkjuna, har drotningin setir bisparnar.

Løgmaður vísir tó á møguleikan, at líkasum tað tríbýtta valdið er væl forankrað ella grundfest í lógarverkinum, so ber eisini til at grundfesta tað kirkjuliga valdið. Hetta skal sjálvandi – inntil Føroyar eru fullveldi og hava egna grundlóg – gerast við eini løgtingslóg, og her vísir løgmaður á, at ein slík løgtingslóg, sum skal tryggja læruna hjá føroysku fólkakirkjuni, kann grundfestast á sama hátt sum eitt nú stýrisskipanarlógin, sum skal samtykkjast av tveimum løgtingum. Sostatt er hon munandi truplari at broyta enn ein vanlig løgtingslóg.

### Skal staðfestast í eini grundlóg

Anfinn Kallsberg sigur seg væl skilja, at fólk ynskja, at fundamentið undir kirkjuni, lutherska læran, skal tryggjast so væl sum gjørligt, og tí heldur hann, at tað eigur at vera grundfest í einari evstu lóg.

Hóast kirkjumál enn als ikki eru viðgjørd í arbeiðnum hjá Grundlógarnevndini, so metir løgmaður tað vera heilt nátúrligt, at læran hjá kirkjuni er staðfest í eini føroyskari grundlóg, meðan sjálv umsitingin av kirkjuni verður staðfest í vanligari løgtingslóg. Í fleiri av teimum nýggjaru grundlógunum, eitt nú í Eysturevropa, eru kirkjulig viðurskifti tó hildin uttan fyri grundlógarparagraffirnar.

Men løgmaður metir, at eingin er í iva um, hvar føroyska kirkjan skal standa, og hóast tað sjálvandi er ógvuliga hypotetiskt, tá bispur sigur, at hann kann vakna sum katolikkur, so eigur fundamentið at vera bundið, sigur Anfinn Kallsberg.

### Løgmaður skal tilnevna bisp

Drotningin er einasti persónurin í danska ríkinum, sum ikki hevur trúarfrælsi. Hon hevur skyldu til at vera limur í donsku fólkakirkjuni. Hesa skyldu hevur ein føroyskur løgmaður sjálvandi ikki, og Anfinn Kallsberg heldur tað vera yvireksponerað, sum hann málber seg, tá Sosialurin sigur, at ávísar røddir innan kirkjuna siga seg harmast um, at ein løgmaður, sum ikki er fólkakirkjulimur, skal hava myndugleika til at tilnevna bisp.

– Tað er embætið og ikki persónurin, sum setir bisp, og ein og hvør, sum verður settur í hetta embætið hevur ávísar skyldur, sum hann skal uppfylla, sigur Anfinn Kallsberg.

Lisbet Christoffersen setti tó spurnartekn við, um ein føroyskur løgmaður fer at verða bundin av tilmælunum frá meinigheitsráðum og prestum, eins og tann danski kirkjumálaráðharrin er í dag. Til hetta sigur Anfinn Kallsberg, at um løgaður skal tilnevna bisp, so skal hann ikki vera bundin. Men hann skal kortini hava ógvuliga góðar grundir, um hann ikki velur at fylgja tilmælunum, tí ein bispur eigur at vera væl forankraður í føroysku kirkjuni, leggur Anfinn Kallsberg afturat.

# Slapp ikki undan teimum ákærdu í rættarsalinum

**Rættarmálið um hópneyðtøku ímóti eini ungari gentu heldur fram, men hon sleppur ikki undan at vitna, meðan teir ákærdu eru til staðar**

HARÐSKAPUR
*Theodor E. D. Olsen*

Mánadagin byrjaði rættarfundurin ímóti teimum fimm ungu monnunum, sum eru ákærdir fyri at hava neyðtikið eina føroyska gentu.

Donsk bløð skriva, at dómarin kravdi, at teir ákærdu vóru til staðar, og tí noyddist gentan at vitna í samfullar fimm tímar í sama rúmi, sum teir ákærdu vóru í, hóast hon hevði biðið um at sloppið undan hesum.

Sambært danskari pressu eyðmýktu dreingirnir gentuna við teirra óhøviska atburði í rættarsalinum og við at siga, at hon sjálv hevði skyldina av, at teir høvdu havt kynsligt samband við hana eftir eitt jólaborðhald næstseinastu jól.

Gentan slapp tó frá at hava beinleiðis eygnasamband við dreingirnar undir rættarfundinum, av tí at teir sótu aftan fyri hana.

Fundurin varð annars hildin fyri stongdum hurðum, men tað er greitt, at frágreiðingin hjá dreingjunum er ein heilt onnur enn tann hjá gentuni. Hon hevur kortini sagt tað sama alla tíðina og ongantíð broytt frágreiðing hesar mánaðirnar, kanningin er farin fram. Harafturímóti sampakkar ikki alt, sum dreingirnir hava sagt, við ymiskar vitnisfrágreiðingar.

Rættarfundurin verður tikin upp aftur í morgin, tá nýggj vitni skulu avhoyrast, og væntandi fellur dómur í næstu viku.



Signar á Brúnni, fyrrverandi landsstýrismaður

# Skelkaður og undrast

**-Tað er ótrúliga álvarssamt og óhugnaligt, at ein maður, ið situr sum løgmaður í dag, viðgongur, at hann hevur framt eitt justitsmorð. Og eg eri skelkaður av, at løgmaður ikki viðgongur hetta fyrr enn ein av hansara monnum skal koma út fyri tí sama, sum eg kom út fyri**

JUSTITSMORÐ
*Jan Müller*



*– Onkur kallar hetta fyri ein uppreisn fyri meg, men skal ein slík brúkast til at bjarga einum fólkafloksmanni og partamanni hjá løgmanni, so er tað uppaftur verri og longur úti enn nakað annað staðfestir Signar á Brúnni*

Hetta sigur Signar á Brúnni, fyrrverandi landsstýrismaður eftir at Anfinn Kallsberg, løgmaður í Degi og Viku týskvøldið viðgekk, at landsstýrið framdi justitsmorð móti sær á sinni. Sjálvur hevur Signar á Brúnni ongantíð verið í iva um, at hann var ósekur í ákærunum og varð hann eisini reinsaður í tí eftirfylgjandi kanningini. Nú vónar hann, at Jørgen Niclasen fær eina virðiligari viðgerð enn hann fekk, uttan at hann tó vil leggja seg út í sjálvt málið. - Onkur kallar hetta fyri ein uppreisn fyri meg, men skal ein slík brúkast til at bjarga einum fólka-floksmanni og partamanni hjá løgmanni, so er tað uppaftur verri og longur úti enn nakað annað staðfestir Signar á Brúnni fyri blaðnum.

Men hesin fyrrverandi og ein hin mest royndi tingmaðurin og landsstýrismaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum gjøgnum árini stendur um somu tíð púra spyrjandi og undrandi, nú tað hoyrist so lítið frá Tjóðveldisflokkinum til tað aktuella málið við Jørgen Niclasen.

– Eg spyrji meg sjálvan, hvussu tað ber til, at man í hesum málinum við Jørgen Niclasen einki hoyrir til Høgna Hoydal og Tórbjørn Jacobsen. Teir vóru annars sera tíðliga úti, tá tað snúði seg um mín persón og um at staðfesta reinføri, ábyrgd ol. Øll minnast, at Høgni Hoydal var ikki frammi í pressuni uttan at nevna reinføri í øðrum hvørjum setningi um m.a. mín persón og mína embætisførslu. Men vit hoyra so ikki eitt orð frá formanninum í Tjóðveldisflokkinum í dag, nú ein frágreiðing liggur frá einum kanningarstjóra, sum er settur sambart Stýrisskipanarlógini. Og tað, sum er komið út frá Tjóðveldisflokkinum í hesum máli, er sera ullint sigur Signar á Brúnni og hann heldur fram:

– Eg ætli mær at fylgja væl við, hvat hendir í hesum málinum og eitt nú leiklutinum hjá mínum egna flokki. Eg vil síggja leiklutin hjá Tjóðveldisflokkinum, hvat hann ger við løgmann og Jørgen Niclasen, nú ein kanningarstjóri er komin við eini frágreiðing.

Signar á Brúnni er annars rættiliga ørkymlaður av tí seinastu útmeldingini frá løgmanni og spyr, um málið viðvíkjandi sær er vorðið til eitt justitsmorð bara tí at man skal brúka tað at hjálpa einum partamanni hjá løgmanni og undrast eisini á, hvussu tað ber til, at Tjóðveldisflokkurin eftir at ein greið frágreiðing fyriliggur, ikki ger vart við seg. Hann spyr, hvat er hent, nú Tjóðveldisflokkurin er so kúrrur! Og hann heldur fram:

– Tá løgmaður alment viðgongur, at landsstýrið framdi justitsmorð móti mær sum landsstýrismanni, so kann eg leggja aftrat, at møguliga er tað seinasta orðið er ikki sagt frá míni síðu í hasum málinum. Sosialurin skilur, at Signar á Brúnni ætlar at kanna, hvat hendir í øðrum samfelag, har ein stjórn ella leiðarin í henni hevur framt eitt justitsmorð móti einum ráðharra. Ella er tað so, at alt gongur í Føroyum spyr fyrrverandi landsstýrismaðurin. – Tá ið ein løgmaður og eitt landsstýri aftanfyri hann hevur framt eitt justitsmorð er spurningur mín: fær tað ikki avleiðingar spyr Signar á Brúnni, sum vísir á, at justitsmorðið varð framt, tá hann varð tvingaður úr landsstýrissessinum, áðrenn kanningin varð gjørd. Justitsmorð er at fella ein dóm, áðrenn ein sak hevur verið fyri og kannað.

Tað undrar annars Signar á Brúnni, nú løgmaður vegna landsstýrið viðgongur, at tað varð framt justitsmorð móti sær sum landsstýrismanni, at hvørki løgmaður ella varaløgmaður hava biðið um fyrigeving.


»Landsstýrið helt tað vera best, um Signar á Brúnni fer sjálvur.
Landsstýrismaðurin var ikki sinnaður at siga seg frá, tí hann metti seg ikki hava gjørt nakað skeivt. Løgmaður gjørdi greitt, at um Signar á Brúnni ikki fer frá sjálvboðin, má løgmaður loysa hann úr embætinum.«

*Kut úr gerðabók landsstýrisins 28. mars 2000, sum snýr seg um embætisførsluna hjá Signari á Brúnni, har greitt verður frá, at løgmaður kravdi, at Signar á Brúnni fór frá sum landsstýrismaður*



*Í Degi og Viku týskvøldið viðgekk løgmaður, at hann og landsstýrið framdu eitt justitsmorð móti Signari á Brúnni*